FYLGISKJAL 4

Viðmerking frá Portal.fo um nýggju miðlastuðulslógina

Vit halda sum heild, at miðlastuðul ikki eigur at vera latin, tí hann ikki fremur nakra menning av vinnuni. Heldur eigur man at hyggja eftir at tað almenna verður tikið úr kappingini við privatu miðlarnar um lýsingar. Í løtuni ger stuðulin bara, at privatu miðlarnir kunnu selja sínar vørur tvær milliónir bíligari enn annars, og at miðlarnir sostatt verða bundnir av árliga stuðlinum. Vit skulu minnast til, at hetta er ein marknaður, har undirbjóðing er gerandisdagur.

Vit meta ikki, at miðlastuðulin økir nakað nevnivert um journalistisku støðvini í vinnuni, men fer beint í raksturin til at rinda nakað, sum lýsingar- og haldarainntøkur annars skuldu gjørt.

Nýggja uppskotið er betri enn verandi skipan, men ger framhaldandi miðlarnar politiskt heftar. Uppskotið gevur møguleikan til verkætlanir, sum helst ikki høvdu verið framdar annars. Ein projektstýrd skipan, fer kanska at skapa nýskapandi verkætlanir, men hetta mennir helst ikki um journalistikkin, altso dagligu viðgerðina av tíðindum. Vit meta, at vandi er fyri, at tað verður nógv umsiting av hesum, og at tey, sum eru tættast knýtt at nevndini, fara at fáa mest í stuðli.

Vit hava áður nevnt, at miðlastuðulin eigur at vera latin journalistum, og at tilfarið, sum verður framleitt fyri peningin, síðani verður tøkt hjá øllum miðlum at brúka. Um ein útvarpssending verður gjørd, so kann ein útvarpsstøð selja lýsingar áðrenn og aftaná. Um tað til dømis er videotilfar, kann tað stuðla undir menning av videolýsingum. Brúkarin velur so hvar hann hyggur ella lurtar eftir tí, og hetta skapar initiativ til menning fyri at presentera tilfarið best.

Fyri at taka samanum, so halda vit, at miðlastuðulin eigur at vera avtikin, og at Kringvarpið skal úr kappingini við privatu miðlarnar um lýsingarpengar. Um ein veruliga ynskir at styrkja journalistikkin og miðlalandsslagið, eigur brúkarin sjálvur at sleppa at avgerða, hvør miðil skal fáa teirra kringvarpsgjald.

Niklái Nysted
Knassar/Portal.fo